## Meiri til vælferð

Kommunurnar í Grønlandi brúka meiri enn 1,6 mia. krónur til vælferð og sosiala trygd í ár. Tað er 120 mió. krónur ella átta prosent meiri enn í 2005. Orsøkin til útreiðsluvøksturin er, at kommunurnar skulu brúka meiri pengar til pensjónir og eldrarøkt, men tær skulu eisini brúka væl meiri pengar til børn, sum verða tikin frá foreldrunum. Hóast útreiðsluvøksturin vænta kommunurnar at hava 50 mió. krónur í avlopi í ár.

## Pallar beinast burtur

Tey seinastu 30 árini hava oljufeløgini brúkt nógvir milliardir krónur til at byggja oljupallar til leiðirnar í Norðsjónum, og nú skulu aðrar milliardir brúkast til at beina teir burtur. Av teimum 600 pallunum, sum eru bygdir hesi árini, eru 55 í danska partinum av Norðsjónum, og í næstum skal støða takast til, hvussu teir skulu beinast burtur. Myndugleikarnir hava skrivað eina frágreiðing um málið, og ætlandi byrjar burturbeiningin um nakrar mánaðir.

Íslenedskt-enskt samstarv kortleggur:

# Hvítabjarnir í Stórabretlandi

FRAMSÝNING
*Leo Poulsen*
*Leo@sosialurin.fo*



Hvítabjarnir er ikki tað mest vanliga at renna seg í í Stórabretlandi, men sjónin er tó ikki heilt óvanlig í statligu bretsku heimunum – og tú kanst sanniliga eisini síggja hetta stásiliga djór í vanligum heimum eisini. Og nú hava myndafólkini Bryndís Snæbjørnsdóttir úr íslandi og enski Mark Wilson ódeyðiliggjørt hesi djór á myndum, sum tey í hesum døgum sýna fram í Norðurlandahúsinum.

Kl. 16 í gjár, mánadag, lat ein myndaframsýning upp í Norðurlandahúsinum. Framsýningin fevnir um myndir av øllum hvítabjarnum, sum finnast í Stórabretlandi.

Tað kann ljóða eitt sindur drápiligt, men talan er kortini um útstappaðar hvítabjarnir, ið jú sum kunnugt eru knapt so vandamiklar sum tær livandi.

Talan er ikki bert um myndir av hesum stásiligu djórum, men eisini um søguna aftanfyri. Tí hvør bjørn hevur sína sermerktu søgu, og tað eru hesar søgurnar eins nógv og sjálvar myndirnar, ið listafólkini vilja siga okkum frá.

Hetta hevur verið ein drúgv verkætlan, sum byrjaði longu í 2001. Og talan var um eitt rættiliga krevjandi arbeiði, tí eingin visti rættiliga at siga um allar hvítabjarnirnar, ið finnast í Bretlandi. Ymsu náttúrusavnini vistu at siga um nakrar fáar bjarnir, men at finna fram til tær, ið eru í privatum heimum, var ein rættilig avbjóðing.

So ótrúligt tað enn kann ljóða, so standa útstappaðar hvítabjarnir í fleiri privatum heimum í Stórabretlandi. Í flestu førum er talan um familjur av betra slagnum, hvørs forfedrar av veiðihugi fóru á veiði- og rannsóknarferðir upp til norðpólin, og tóku upp til fleiri hvítabjarnir heim aftur við sum minni frá ferðini. Nakrar av hesum bjarnum vórðu útstappaðar, meðan aðrar vóru latnar ella seldar djóragørðum – í livandi líki, væl at merkja.

### Sýna fram víða um

Mark Wilson greiðir frá, at tey hava funnið fram til 33 hvítabjarnir, og tey hava avmyndað 32 teirra. Í 33. førinum var talan um ein deyðføddan unga.

»Vit hava eina framsýning standandi uppi í Hornyman-náttúrusavninum í London, og síðani hendan framsýningin lat upp, eru einar 3-4 hvítabjarnir aftrat komnar í ljósmála«, greiðir Mark Wilson frá.

Hvítabjarnirnar eru komnar til Bretlands í tíðarskeiðinum seinnapartin av 18. øld og fram til ártúsundskiftið. Hin fyrsta kom seinast í 18. øld og hin seinasta í 1999. Flestu bjarnirnar finnast í Onglandi, men 5 eru eisini til skjals í Skotlandi og ein í Dublin í Írlandi.

Sjálv framsýningin, ið tók heili 5 ár at savna, hevur ferðast rættiliga víða. Hon hevur verið hildin í Oxford, Bristol og nú London í Onglandi, í Keypmannahavn, Reykjavík og nú altso í Norðurlandahúsinum í Havn, har hon verður opin fram til páskar.

Og sum eitt lítið kuriosium hevði Norðurlandahúsið lánt eina veruliga útstappaða hvítabjørn, sum til gerandis stendur til framsýningar á Náttúrugripasavninum. Hedvig Westerlund-Kapnas, ið samskipar framsýningina fyri Norðurlandahúsið, greiðir frá, at hendan hvítabjørnin varð útvegað í sambandi við framsýningina um veiðimentan í útnorði, ið varð hildin í 2001.

Hvítabjørnin kom úr Grønlandi og bleiv útstappað í Svendborg. Og rættiliga passandi var tað felagið Hvítabjørn, ið sponsoreraði navnafelagan, sum nú er ogn hjá Føroya Náttúrugripasavni.

# Flokkar fáa herðaklapp frá Demokratia

**Demokratia fegnast um nýggja stigið hjá Sambandsflokkinum og Tjóðveldisflokkinum, sum felagsskapurin kallar eitt stig fram á javnstøðuleið**

JAVNSTØÐA
*Kári Mikkelsen*

Sum kunnugt varð altjóða kvinnudagur hildin 8. mars, har stórt fokus varð sett á javnstøðu og javnrættindi til kvinnur. Hetta er ivaleyst ein høvuðsorsøk til, at valfeløg hjá tveimum so ymiskum flokkum sum Sambandsflokkinum og Tjóðveldisflokkinum, hvør í sínum lagi vilja arbeiða fyri, at fáa fleiri kvinnur á uppstillingarlistarnar til komandi løgtingsval.

Formaðurin í Norðoya Sambandsfelag, John William Joensen, hevur meldað út, at felagið á aðalfundinum 29. mars, sum eisini er fyrsti uppstillingarfundur til løgtingsvalið, fer at mæla til at stilla eins nógvar menn og kvinnur upp. Harafturat hevur formaður floksins, Kaj Leo Johannesen, boðað frá, at javnstøða skal vera í flokkinum í seinasta lagi í 2012.

Eysturoyar Tjóðveldisfelag samtykti á aðalfundi seinasta fríggjakvøld, at eins nógv av báðum kynum verða stillaði upp í Eysturoyar valdømi til komandi løgtingsval. Felagið sigur haraftrat, at tað ætlar at leggja nógv fyri fyri at fremja javnstøðu í politikki.

Tiltøkini hjá teimum báðum politisku feløgunum fáa nú eitt herðaklapp frá felagsskapinum, Demokratia.

- Við hesum hava Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin víst seg sum tveir modernaðar og framburðssinnaðar flokkar, sum ikki góðtaka status quo, men tora at bróta upp úr nýggjum og skilja fyrimunirnar við at gagnnýta alt menniskjutilfeingið, skrivar Demokratia í tíðindaskrivi og ynskir samstundis flokkunum báðum hjartaliga tillukku og góða eydnu.